# Hava lagt skúlarnar saman í tvær vikur

**Seinastu tvær vikurnar undan jólafrítíðini, eru skúlarnir, Norðskála-Oyrar skúli og skúlin í Tjørnuvík, lagdir saman í ein skúla**

SKÚLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Jón Magnus Joensen er einasti lærari í Tjørnuvíkar skúla. Óla Jákup Joensen er skúlastjóri í Norðskála-Oyrar skúla á Oyrarbakka*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tey átta børnini, sum ganga í Tjørnuvikar skúla og tey 52 børnini, sum ganga í barnaskúlanum, Norðskála-Oyrar skúli, á Oyrarbakka, hava seinastu tvær vikurnar verið savnaði í skúlanum á Oyrarbakka. Samstundis hevur lærarin í Tjørnuvík, sum er Jón Magnus Joensen, eisini verið á skúlanum á Oyrarbakka saman við teimum 6 lærarunum, sum frammanundan starvast har.

Skúlastjóri á Oyrarbakka er Óla Jákup Joensen, og tað er hann, sum eigur hugskotið til átakið.

Skipað hevur verið fyri ymiskum tiltøkum á Oyrarbakka hesar dagarnar, næmingar og lærarar hava verið savnaðir, og í blaðnum leygardagin fara vit at prenta fleiri myndir, sum tiknar eru á skúlanum hesar dagar.

Allir næmingarnir á skúlunum báðum hava verið aktivir í teimum tiltøkum, sum verið hava, og serliga hava tey vant smáar sjónleikir, sum lærarar hava skrivað. Fleiri framførslur hava verið ymsastaðni, og bæði næmingar og lærarar eru fegnir um hesa læruríku og gevandi tíðina, teir hava verið undir sama taki.

Bæði Óla Jákup Joensen og Jón Magnus Joensen siga, at átakið krevur nógv meira av skúlanum enn vanlig skúlagongd, men teir fegnast um, at stig vórðu tikin til átakið, sum hevur eydnast ógvuliga væl.

- Hesir dagarnir hava verið rættiliga nógv øðrvísi enn vanligir skúladagar. Málið er at samstarva, og hetta hevur verið mennandi fyri bæði næmingar og lærarar.

Teir siga, at alt er planlagt niður í minstu smálutir, og tað er eisini neyðugt, tá ið farast skal undir slíkt átak.

Jón Magnus Joensen sigur, at tiltakið eisini kemur næmingunum í Tjørnuvíkar skúla til góðar, tá ið hesir seinni fara á framhaldsskúla á Oyrarbakka.

- Vit kunnu ráða øðrum skúlum at taka slík stig, men neyðugt er at hava í huganum, at hetta er rættiliga arbeiðskrevjandi.

Óla Jákup Joensen og Jón Magnus Joensen eru fegnir um, at alt hevur gingist so væl.



*Seinastu tvær vikurnar hava næmingar úr Tjørnuvíkar skúla og Norðskála-Oyrar skúla verið undir einum taki á Oyrarbakka. Mynd: Vilmund Jacobsen*

Føroyskir Fiskimenn Uttanlands:

# Aðalfundur og pallborðsfundur í Havn

**Við pallborðið sita Anfinn Kallsberg, løgmaður, Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag og løgtingslimirnir, Hendrik Old, Alfred Olsen og Kári P. Højgaard**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Felagið hjá føroyskum fiskimonnum uttanlands, FFU, heldur aðalfund á Hotel Hafnia fríggjadagin, 19. desember. Fundurin byrjar kl. 15 og umframt vanligu aðalfundarskránna, verður eisini pallborðsfundur.

Við pallborðið sita Anfinn Kallsberg, løgmaður, Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag og løgtingslimirnir, Hendrik Old, Alfred Olsen og Kári P. Højgaard.

## Nógv mál

Høgni W. Høgnesen, sum er formaður í felagnum, Føroyskir Fiskimenn Uttanlands, sigur, at nógv mál verða til umrøðu á fundinum.

- Vit ætla at røða um sjómansskattin, ferðafrádrátt og frádrátt fyri proviant.

Hann sigur, at eitt annað mál, sum eisini kemur til umrøðu, er frádrátturin fyri teir fiskimenn, sum rinda 7,8% av lønini til norska kommunu, haðani teir sigla út frá.

- Vit fara eisini at tosa um sosialar veitingar, pensjónir og annað, sigur Høgni.

## Spurningar

Undir pallborðsfundinum verður eisini høvi hjá sjómonnum at seta fram spurningar til luttakararnar við pallborðið.

- Eg vóni, at limir felagsins møta fjølmentir at umrøða hesi mál, sum viðvíkja okkara umstøðum, sigur formaðurin, sum annars ynskir øllum eini gleðilig jól og gott nýggjár.

Høgni W. Høgnesen hevur í fleiri ár verið formaður í felagnum hjá føroyskum fiskimonnum uttanlands, og sjálvur siglir hann sum maskinmaður umborð á norskum fiskiskipi.



*Føroyskir fiskimenn, sum sigla í øðrum londum, halda aðalfund á Hotel Hafnia í dag, 19. desember. Á skránni verður eisini pallborðsfundur*

# JÓLASÍÐAN



































